

www.oljan.fo

**Jan Müller** 17 - 12 - 2011

# 2011 - Hægsti oljuprísur gjøgnum tíðirnar

Hóast árið enn ikki er liðugt, so bendir alt á, at 2011 verður tað árið í oljusøguni við hægsta meðal oljuprísinum. Hann sær út til at gerast 111 dollarar fyri tunnuna. Tað verður sostatt hægsti meðalprísurin á ráolju síðani amerikanska borgarakríggið. Byrjað varð at gera upp árliga meðalprísin á olju longu í 1860, umleið eitt ár eftir at nútímans oljuídnaður tók seg upp í statinum Pennsylvania í USA. Hetta vísir ein kanning, sum HIS Cambridge Energy Research Associates hevur gjørt. Nú 150 ár seinni er enn eitt met gjørt. 2011 sær út til at fáa ein meðalprís uppá 111 dollarar fyri tunnuna. Tað er ein munandi hækking í mun til metið í 2008, tá meðal oljuprísurin eitt ár var 97 dollarar. Orsøkin til høga oljuprísin í 2011 er eitt samanspæl millum vaksandi forbrúkið, sum er rokkið uppá 89 milliónir tunnur um dagin, her serstakliga í ASIA og síðani hóttania frá oljuframleiðandi londum í Miðeystri og Norðurafrika um minkandi oljuframleiðslu. Annað, sum hevur ávirkan á oljuprísin, eru vaksandi útreiðslur til lønir og tilfar og tann sannroynd, at royndir verða gjørdar at finna og framleiða olju í meira avbjóðandi økjum sigur Daniel Yergin frá HIS CERA stovninum í eini viðmerking.